# 10 DREYMAFERÐIR

Niels Uni Dam er 33 ár og blaðmaður á Sosialinum. Honum dámar væl at ferðast. Hann hevur ferðast rættiliga fitt í lívi sínum, mest kring Evropa men eisini eitt so fjarskotið stað sum Ný Sæland. Í hesum døgum sigur Niels Uni okkum 10 ferðamál, ið hann hevur hug at vitja. Hann sigur, at hetta verður eitt gott bland av støðum, ið hann hevur vitjað og vil vitja aftur, støðum, ið hann ongantíð hevur vitjað, men kundi hugsað sær at vitjað.



## Dreymaferð nr. 6:

# Barcelona



Eg var í Barcelona í 1991, hetta var partur av interrail ferð míni, ið eg var á saman við vinmanni mínum Emil Hermansen. Vit ferðaðust kring Evropa í ein mánað, og fóru har sum hugurin og tokini tóku okkum. Vit endaðu á einum stórum kampingplássi beint við Barcelona. Strondin við plássi var fantastisk, og havið var heitt. Maturin, ið vit keyptu á matstovuni var ómetaliga góður, sera væl kryddaðir nýslaktaðir høsnarungar vóru á okkara matskrá hvønn dag.

Barcelona var ein sera bergtakandi býur, við nógvum flottum bygningum og uttandura list. Serliga størsligið var at vitja Katedralin La Sagrada Familia. tí ongantíð áður havi eg kent meg so lítlan í ævinleikanum. Kirkjan, ið heimskendi arkitekturin Antoni Gaudi brúkti 40 ár av sínum lívið til, harav alla sína tíð seinastu 15 árini fyri deyða sín, er eitt stórt meistaraverk, hvørs grundarsteinur varð lagdur í 1882, men sum als ikki er liðugt enn. Tá tú vitjar kirkjuna eru partar lidnir og síggja gamlir út, meðan aðrir partar av kirkjuni blíva bygdir beint nú. Tú veitst, at tú kanska ikki livir at síggja kirkjuna lidna. Hetta er ein stór uppliving.

Eg vil sera fegin vitja Barcelona aftur, og ikki minst vitja La Sagrada Familia aftur.



















